*Ólavsøkan ár 2000:*

# Vi› spekt og sóma

Aftur stendur ólavsøkan fyri durum, og eru fyrireikingarnar nógvar framman undan tjó›arhátí› okkara, har vinir og kenningar hittast, bæ›i til gamans og álvara; ta› er sera umrá›andi, at tann, sum ætlar sær til hesa stóru tjó›arhátí›, fær fatur á tí rætta endanum, solei›is at hesir dagar ver›a hildnir vi› spekt og sóma, og vita skulu vit, at nógv eygu eru vend ímóti okkum hesar dagar av fer›afólki uttan úr heimi, og solei›is sum vit hátta okkum hesar dagar, er stórur vandi fyri at fremmandafólki› fær hesa mynd av landi okkara.

Ta› eru nógvar avbjó›ingar slíkar stevnudagar, kanska nógv meira enn ta› var fyri bert fáum árum sí›ani; og sjálvur haldi eg at ólavsøkuskráin er alt ov long, og sigur ta› seg sjálvt, at ta› kemur at hava álvarsligar avlei›ingar fyri einstakar persónar, vit menniskju eru so ymisk bæ›i so og so, og trupulleikarnir hjá hesum ymisku menniskjunum eru ógvuliga ymiskir frá persóni til persón, nøkur eru sterk, onnur eru veik og kunnu sostatt falla fyri einari ella a›rari snellu, sum ver›ur sett fyri tey til óbótaligan ska›a, ja, so stóran ska›a, at tey hava ilt vi› at fóta sær aftur.

Vit fegnast sjálvandi um øll tey fremmandu fer›afólkini, sum koma at vitja okkum, eisini á ólavsøku fyri at uppliva hvussu vit halda ólavsøku og er ta› tí sera umrá›andi at vísa spekt og sóma hesar dagar, solei›is at tey kunnu fara heim aftur til sín sjálvs vi› ríkum minnum um ólavsøkuhald okkara og sjálvandi geva okkum bestu vi›mæli og umdømi.

### Ólavsøkuaftan

Ein av teimum hugnaligu og ógloymandi løtunum á ólavsøku er tá ólavsøkan ver›ur sett ólavsøkuaftan, tá tann ovurstóra mannfjøldin kemur saman á Vaglinum til setanina og ikki at gloyma skrú›gonguna oman á Vagli› og so síggja okkara vakra ítróttarungdóm inni á tinghúsvøllinum í sínum vøkru og litføgru ey›kennisbúnum, ta› er sanniliga ein vøkur sjón; jú, vit eiga ein vakran og mergja›an ungdóm, sum megnar at taka tøk fyri land og fólk okkara, Gud signi tykkum og framtí› tykkara, hann gevi tykkum skynsemi til at í›ka ítrótt vi› røttum ítróttaranda.

Latum okkum ongantí› gloyma hví vit halda ólavsøku, at vit minnast Ólav hin heilaga, sum ikki skamma›ist at lyfta krossmerki› høgt í síni samtí›, og mátti sostatt lata lív á Stiklastø›um í bestu árum, hetta eigur at fáa okkum at vir›a alt ta›, sum heilagt er, og at or› Guds ver›ur ta› berandi í lívi okkara, ikki einans á ólavsøku, men allar lívsdagar okkara. Um vit gera ta›, so fáa vit eina gó›a ólavsøku.

### Ólavsøkan og or› Guds

Ta›, sum gevur ólavsøkuni innihald er or› Guds, tí at ta› gevur okkum alt ta› okkum tørvar fyri at náa ta› himmalska heimi›, sum okkum er ætla› vi› Jesusi Kristi. Gudstænastan í Havnar kirkju (dómkirkjan) er fyri meg av allar størsta t‡dningi; tá landsins kosnu menn og kvinnur, kirkjuligir myndugleikar og í ár eisini a›rar samkomu uttan fyri fólkakirkjuna eru bo›in vi› í sambandi vi› 1000 ára haldi› fyri kristindómin í landi okkara, tá hesi koma í skrú›gongu úr tinghúsinum og oman í kirkjuna, sigur hetta okkum, hvussu alney›ugt ta› er at sjó›a Gudslív og dagligdagin saman, innan sum uttan fyri tinggátt.

Vit kunnu ongantí› takka Gudi nokk fyri at or› hansara so ríkiliga ver›ur bori› fram á ólavsøku, bæ›i innandura og undir opnum himli; hetta eiga vit at fegnast um, at vit eiga hetta ríkidømi at Guds or› er hægsti myndugleikin í lívi okkara; tí vil eg siga vi› ein og hvønn av okkum, latum okkum ste›ga á og hoyra hvat Gud hevur at siga vi› okkum ígjøgnum sítt or› vi› sínum vitnum, hann styrki tykkum, sum hesa ólavsøku skulu bera or› Guds fram, ta› veri seg inni ella úti, solei›is at menniskju koma í ney› av sínari synd, venda sær til Gud ígjøgnum Jesus Kristus, bi›ja um fyrigeving fyri sína synd, tá fáa vit av sonnum eina gó›a ólavsøku, tá øll syndabyr›an er tikin av her›unum og vit eru frí.

### Ólavsøkan og rúsdrekka

Ta› hevur mangan veri› ført fram, at stórar broytingar eru farnar fram tey seinastu árini, eisini hvat vi›víkur ólavsøkuhaldi, og ta› er so satt sum ta› er sagt og tíverri er ta› ikki alt til ta› betra. Her hugsi eg serliga um rúsdrekka og onnur rúsandi evni, sum eru til ampa fyri lív og heilsu; tí vil eg siga vi› tykkum ungu, sum fara til ólavsøku og kanska ongantí› hava smakka› rúsdrekka ella onnur rúsandi evnir, lati› vera, taki› ikki av um ta› stendur tykkum í bo›i, um tit ongantí› smakka ta›, so ver›a tit heldur ongantí› trælir av rúsandi evnum.

So er bert eftir at ynskja, at tit fáa eina gó›a og rúsfría ólavsøku, solei›is at tit koma heim aftur av ólavsøkuni vi› gó›um minnum um at Gud hin alvaldi gav tykkum mátt til at siga nei takk til alt ta›, sum kann tøla tykkum. Sí›an vil eg enda vi› einum sangi, sum eg havi yrkt til hesa ólavsøkuna. Gó›a ólavsøku, øll somul.

### *Ólavsøkusangur*

*Lag: Nú hvítna tindar. Hj. 261*

Nú Havnin flaggskr‡dd, føgur er,
á Føroya tjó›ardegi;
ta› mót ólavsøku ber,
hvørt mannsbarn er so fegi›.

Til Havnar stevna kvinnur, menn,
vi› álvara og gaman;
ja, børn og vaksin, øll í senn,
her fegnast øll til saman.

Á Vaglinum stór mannfjøld er,
so fegin og so føgur;
og ma›ur, kvinna rø›u ber,
vit eru systrar, brø›ur.

Ta› fløva má hvørt hjarta her,
tá skrú›gongan, hon kemur;
ein vakur ungdómur tá fer,
til verka, ítrótt fremur.

Úr tinghúsi, í kirkju fer,
ein skrú›gonga so blanda›;
sum okkum øllum bo› her ber,
at kristnin kom til landa.

Lat okkum tí ei gloyma nú,
hvat ólavsøkan merkir;
at hann, sum b‡r í himnabú,
hann mennir oss og styrkir.

*Kjartan Stakksund*

## nøvn nú

### Heilsanir

***Gó›i gubbon***
Hjartaliga tillukku vi› piparinum 20. juli. Alt gott í framtí›ini ynskja ogur heimanfyri.
***Barbara***

***Gó›i Niels Petur***
Hjartaliga tillukku vi› 30 ára degnum og alt gott í framtí›ini.
***Heilsan mamma, pappa og systkin***

***Ársins piparsveinur!***
Hjartaliga tillukku vi› piparinum ogur eru spent til í kvøld.
***Heilsan Tór›ur, Maria, John, Barbara og Rani***


nøvn nú **5 ferðir um vikuna** 25,- kr.

**GEVIÐ GÆTUR:** Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..............................................

..............................................

..............................................

..............................................

..............................................

..............................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ..............................................
Bústaður: ..............................................
Bygd/býur: ............................ Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**